# Upplæring í læknavakt hjá útbúgvingarlæknum

Um ein útbúgvingarlækni hevur ynski um at fáa førleikar at taka sjálvstøðugar vaktir, so skal hann gjøgnum eitt frálæruprogram at fáa hesar førleikar. Hetta er IKKI tað sama, sum at fáa sínar kompetansur ísv. útbúgvingarprogrammið. Tað er tó eitt yvirlapp, so tað kann verða ein fyrimunir at hava bæði skjøl við.

Um ein útbúgvingarlækni velur at fara ígjøngnum hetta programmið áðrenn útbúgvngarprogrammið krevur tað, so er tað í egnari tíð og skal ikki avspadserast. Tað skal ikki ávirkað tað fasta arbeiði í td. viðtalum ella á sjúkrahúsinum

Tá man er á fylgivakt, so fær tutor lønina. Sjálvstøðugar læknavaktir verða løntar av Heilsutrygd.

Førleikarnir skula takast í tí rekkifylgju, sum stendur niðanfyri.

Í so fall at tutor ikki tekur vaktir, so kann gerast ein avtala við ein annan kommunulækna at fáa sínar fylgivaktir.

Um man hevur aðrar viðkomandi royndir, so er tað upp til vaktleiðarin at meta um tað kann víkjast frá omanfyristandandi mannagongd.

<table>
<tr><th>Koyrivaktir</th><th>Dagf.</th><th>Hevur lutikið nøktandi<br>(undirskrift)</th></tr>
<tr><td colspan="3">Skal hava introduktiónsstarv í almen medicin. Skal fyrst hava 5 koyrivaktir saman við tutor sum bakvakt. Tutor skal eisini verða tøkur at fara á heimavitjan í fall tað er tørvur á tí. Tutor fær tímalønina og útbúgvingarlæknin fær ”ydelse” um hann koyrir út einsamallur.<br>Útbúgvingarlæknin skal ringja til tutor at konferera.<br>Um man eftir 5 vaktir enn ikki hevur verið eina heimavitjan, so má man hava fleiri koyrivaktir til man í minsta lagið hevur verið 1 heimavitjan.<br>Í byrjanini av vaktini ringir tutor til visiterandi lækna at upplýsa telefonnummari hjá útbúgvingarlæknanum, so hann verður móttakari.<br>Tá hetta er uppfylt, so sigur vaktleiðari frá at læknin kann upprættast í vaktplan og hevur førleikar at taka koyrivaktir.</td></tr>
<tr><td>Verið rundtúr við vaktleiðara og lisið vagthåndbog</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td rowspan="5">5 koyrivaktir, við tutor sum bakvakt</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td></tr>
<tr><td></td><td></td></tr>
</table>

| **Náttvisitation** | **Dagf.** | **Hevur lutikið nøktandi** (undirskrift) |
|---|---|---|
| Skal hava høvuðsútbúgvingarstarv. Skal hava 3 fylgivaktir við tutor. Skal verða visiterandi helvtini av tíðini.<br>Tá hetta er uppfylt, so sigur vaktleiðari frá at læknin hevur førleikar at taka náttarvaktir. | | |
| 3 dag/kvøld fylgivaktir við tutor | | |
| | | |
| | | |

| **Dag/kvøld visitation** | **Dagf.** | **Hevur lutikið nøktandi** (undirskrift) |
|---|---|---|
| Skal hava høvuðsútbúgvingarstarv. Skal hava havt 3 sjálvstøðugar náttarvaktir. Um tað ikki ber til at fáa náttarvaktir, so kann man eisini hava 3 fylgivaktir afturat í dag/kvøld, har man fungerar sum primære læknin.<br>Tá hetta er uppfylt, so sigur vaktleiðari frá at læknin hevur førleikar at taka dag/kvøldvisitatión. | | |
| 3 sjálvstøðugar náttarvaktir *ella* 3 fylgivaktir við tutor, har man er primære læknin | | |
| | | |
| | | |